FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Umhvørvis- og vinnumálaráðið**

Tórshavn 6. oktober 2022

## Hoyringssvar til broytingar í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur tann 15. september fingið uppskot til broyting í løgtingslóg um barsilsskipan til hoyringar. Felagið hevur hesar viðmerkingar til broytingaruppskotið.

**Hækka hámarksútgjaldið:**

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við at hækka hámarkið fyri mánaðarliga barsilsútgjaldið.

Barsilsútgjaldið hevur verið óbroytt síðani 2004, tá tað fór úr 35.000 kr. niður í 25.000 kr. um mánaðin. Í tíðarskeiðnum frá 2004 til í dag er lønarlagið í Føroyum tó hækkað munandi. Tá hámarkið varð lækkað til 25.000 kr., var hetta hámarkið uml. 150 % av einari fulltíðar arbeiðaraløn. Í dag er hámarkið umleið ájavnt við eina fulltíðar arbeiðaraløn við 5 ára royndum. Hetta merkir, at ein rættiliga stórur partur av fólkunum, sum fáa barsilsútgjald, verða avmarkað av útgjaldshámarkinum í mun til sína vanligu mánaðarløn.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tí, at tíðin er búgvin til at hækka hámarkið í barsilsskipanini munandi. Ein hækking á 2.000 kr. er tó ov lítil til at gera veruligan mun. Tí er rættari at hækka útgjaldið enn meira, so tað samsvarar betur við dagsins inntøkur hjá føroyska løntakaranum.

**Stytta tíðarskeiðið:**

Fyri at fíggja eitt hægri útgjald kundi útgjaldstíðarskeiðið verðið stytt. Tá tíðarskeiðið varð longt í 2021 gjørdi Føroya Arbeiðsgevarafelag vart við, at vit hildu ikki at rætta loysnin var at leingja útgjaldstíðarskeiðið, men heldur at hækka útgjaldsupphæddina. Henda viðmerking varð tó ikki tikin til eftirtektar, og vit hava tí farloyvi í heili 52 vikur við útgjaldi, umframt 4 vikur undan føðing. Hetta er millum hægstu útgjaldstíðina í heiminum. T.d. kann nevnast at tíðarskeiðið við barsilsgjaldið í Danmark er 48 vikur, og 4 vikur undan føðing.

Føroyski arbeiðsmarknaðurin hevur í longri tíð verðið undir stórum trýsti vegna lágt arbeiðsloysi, og Føroya Arbeiðsgevarafelag vil leggja dent á týdningin av, at starvsfólk varðveita eitt gott samband við arbeiðsplássið. Tí er okkara fatan, at besta loysnin er at barsilsútgjaldið hækkar munandi, og at hækkingin verður fíggja við at taka nakrar vikur av tíðarskeiðnum. Við eini umfordeiling av vikum og útgjaldið verður

fíggjarliga grundarlagið hjá familjuni styrkt í barsilstíðarskeiðnum, og vit hava framhaldandi eina nútímans og kappingarføra skipan, har gevur familjuni bestu umstøður fyrstu tíðina hjá nýføddа barninum.

**Kostnaðurin:**

Sambært uppskotinum skal gjaldið til barsilsgrunnin hækka úr 0,86% til 0,89%. Í viðmerkingunum til broytingaruppskotið verður sagt, at hetta ikki ein útreiðsla fyri løntakara ella arbeiðsgevara, tí ALS gjaldið lækkar, og harvið lækkað arbeiðsmarknaðargjøldini 0,17 prosentsitg. Til hetta hava vit tvær viðmerkingar.

Tann fyrsta snýr seg um, at tað áður hevur víst seg at verða trupult at gera framrokningar ísv. inn- og útgjøld í Barsilsskipanini, og tí eiga vit at verða sera varin at fremja hækkingar, soleiðis at skipanin ikki gerst óneyðuga kostnaðarmikil.

Seinna viðmerkingin er, at hækkingin verður grundgivin við, at ALS gjaldið verður lækkað. Harvið verður gjaldið til ALS og Barsilsskipanini onkursvegna knýtt saman. Tað var eisini støðan, seinast ein broyting var í inngjaldinum. Vit halda ikki, at tað er rætt at knýta hesi gjøld saman. Arbeiðsloysið hevur verið søguliga lágt í langa tíð, og tí eru nógvir pengar í ALS grunninum í løtuni. Men hvat hendir, tá støðan broytist, soleiðis at arbeiðsloysið aftur finnur eitt meira vanligt støði ella hækkar? Tá kann verða neyðugt at hækkað ALS gjaldið aftur. Tí er ikki neyðturviliga ein samanhangur millum ALS gjaldið og barsilsgjaldið. Grundgevingarnar í uppskotinum tykjast at knýta hesi gjøldini saman, so tað í veruleikanum ikki er ein hækking fyri tey, sum rinda til skipanirnar. Tað er sum so rætt, men tað er einans støðan beint her og nú.

Niðurstøðan er, at Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur ikki undir við uppskotinum í verandi líki. Neyðugt er at hækkað mánaðarliga barsilsútgjaldið, men felagið heldur, at hækking skal verða munandi, og at 2.000 kr. um mánaðin er ov lítið. Heldur eigur skipanin at verða umskipað uttan ein meirkostnað, soleiðis at vikutalið verður stytt nakað fyri at fíggja eitt hægri útgjald.

Vinarliga

Føroya Arbeiðsgevarafelag

Jórun Gardar

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo